# Sálarlig heilsa hjá føroyskum barnakonum undir viðgongutíðini og aftaná føðing

*Ein landsdekkandi tvørsektoriel granskingarverkætlan*


Sanne Storm, verkætlanarleiðari (PhD og Cand.mag í musikterapi), Psykiatriski Depilin

Annika Hoydal og Margretha Thomsen, ljósmøður, Ljósmøðratænastan

Sólrun Foldbo, heilsuróktarfrøðingur, fakligur leiðari hjá Gigni


23. september 2022

# Yvirskrift fyri hesa framløguna?

- Bakgrund
- Endamál
- Mannagongd
- Nøkur av teimum týdningarmiklastu úrslitunum

# Bakgrund

- Gigni byrjaði 2012 at screena allar nýggjar mammur– *fyrsta landsdekkandi kanning vísti, at 18 % av fyrstuferðseigandi vístu tekin um føðitunglyndi í lættan til moderatan/sveran grad*

- Praksis vísti, at tekin um tunglyndi og angist vístu seg longu í viðgongutíðini

- Gransking uttanlanda: Tunglyndi og angist mest vanligu avbjóðingarnar hjá barnakonum. Týdningarmikið at fáa eyga á teknini tíðliga og at viðgera.

- *Sálarheilsa hjá barnakonum í viðgongutíðini var ikki kannað fyrr í Føroyum*

# Endamál

- Kanna sálarliga heilsu hjá føroyskum barnakonum *undir viðgongutíðini og aftaná føðing*

- Kanna um *somu kvinnur,* sum eru sálarliga avbjóðaðar í viðgongutíðini, eisini eru tað aftaná

- Shared-care – Ljósmøðratænastan, Gigni og Sertoymi Barnsburðartunglyndi



# Metoda

- Ljósmóðirtænastan –
    - *Eyka ljósmóðirviðtala við fokus á ”Hvussu hevur tú tað?”*
    - *Screening*

- Gigni
    - *Screening eftir føðing*
    - *Dokumentatiónin – screeningsúrslitini verða funnin í arkivum hjá Gigni*

- EPDS (Edinburgh Postnatal Depression Scale):
    - 0-9 stig= ongi tekin um manglandi trivnað
    - 10-12 stig= løtt til moderat grad av risiko fyri at fáa føðitunglyndi (tørvur verður røktur av ljósmóðirtænastuni og Gigni)
    - 13+ stig= sver grad av risiko fyri at fáa føðitunglyndi´(ávísing til Sertoymið barnsburðartunglyndi til nágreiniligari samrøðu)

- Eyka spurnarskemakanning

- 736 fingu innbjóðing
- 121 kundu ikki vera við
- 191 takkaðu nei
- 424 takkaðu ja (69%) – vísir ein sterkan validitet
- Av teimum 424 luttakarunum vóru 382 (90%) EPDS-
- screeningsúrslit funnin í arkivum hjá Gigni
- (tað bar tí til at kanna tørvin áðrenn og eftir føðing)



# Úrslit av sálarheilsu undir viðgongutíðini

- 18 % tilsamans av barnakonunum vóru í vandabólki fyri føðitunglyndi í løttum ella sverum gradi

- 0- 9 stig= 82 % *vístu ongi tekin um manglandi trivnað – og komu tí ikki í tann bólkin, sum fingu eyka samrøðu ella ávísing til sertoymi*

- 10-12 stig= 10 % *vístu lættan til moderatan vanda fyri føðitunglyndi. Ljósmøðratænastan bøtti um hendan tørvin*

- 13+= 8 % - *allar fingu tilboð um ávísing til sertoymið barnsburðartunglyndi*

# Úrslit av sálarheilsu aftaná føðing

- 11 % í vandabólki fyri føðitunglyndi í lættan ella sveran grad eftir føðing

- 0-9 =89% *vístu ongi tekin um manglandi trivnað*

- 10-12=5% *vístu løtt til moderat tekin um vanda fyri føðitunglyndi*

- 13+=6 % *vístu í sveran mun tekin um vanda fyri tunglyndi*

# Úrslit av komparativu kanningini

- Hvat avdúkaði tann komparativa kanningin?

- 12% vóru í løttum til sverum vanda fyri tunglyndi undir viðgongutíðini – men ikki í vanda aftaná føðing
- 5 % vóru ikki í vanda fyri føðitunglyndi undir viðgongutíðini, men vóru í vanda aftaná føðing
- 6 % vóru bæði í vanda undir viðgongutíðini og aftaná føðing

- Ergo: í flestu førum eru tað ikki somu kvinnur, sum eru í vanda í viðgongutíðini og aftaná føðing
- Hettar peikar á týdningin av einum skjótum og heilsufremjandi innsatsi bæði undir viðgongutíðini og eftir føðing.

# Hvat eyðkennir bólkin sum bæði var í vanda undir viðgongutíðini og eftir føðing?

- Søga við traumatiskum upplivingum *áður*
- Upplivingar við misbrúki, tunglyndi, sjálvmorð, sjálvskaði í nærmastu familju
- Høgt angist- og strongdarstig undir viðgongutíðini
- Flestu høvdu havt eina sálarliga sjúku sum vardi meir enn 6 mánaðir

# Viðurskifti sum spæla ein leiklut í mun til angist, strongd og føðitunglyndi áðrenn og eftir føðing

- Ungur aldur 17-24 ár
- Fyrstuferðseigandi
- Høgt angist stig ella stórur ótti fyri føðing
- Søga við áður traumatiskum upplivingum
- Sálarlig sjúka
- Fáar sosialar relatiónir

# Serføroysk viðurskifti – small scale society

- At vera komin heim til Føroya ella fluttur til Føroya innan seinastu 3 árini
- At búgva í húsið saman við foreldrum ella verforeldrum

# Áður traumatiskar upplivingar

- 56 % hava upplivað traumatiskar hendingar áður
- 45 % hava upplivað misbrúk, tunglyndi, sjálvmorð ella sjálvskaða í nærmastu familju
- 15% hava upplivað traumatiskar føðingar áður

# Viðmælir frameftir

- Framhaldandi tvørsektorielt, fleirfakligt  samstarv
- At veita fyribyrgjandi og heilsufremjandi stuðul móti angist, tunglyndi og strongd
- Framhaldandi tilboð um screening í Ljósmøðratænastuni og Gigni
- Bæði foreldur takast við
- Lætta atgongd (fáar dagar)
- Toymið skal hava sálarfrøðiliga, psykotraumatiska og psykiatriska vitan og royndir
- Ein traumabaserað tilgongd og forstáilisi hjá heilsufakfólki



# Túsund takk til:

- Allar kvinnurnar, sum stuðlaðu, so hendan verkætlanin varð møgulig
- Psykiatriska Depilin, Gigni, Ljósmøðratænastuna, Sjúkrakassagrunnin/Granskingarráðið
- Starvsfelagar, vinir, familja og mong onnur, sum hava stuðlað, uppmuntrað og hjálpt í dagligdegnum, á arbeiðsplássinum, til reflektión og nógv annað
- Ask Elklit, Professara, leiðari av Psykotraumatiska vitanarcentrinum í SDU
- Rapport kann lánast á bókasavninum og kann downloadast ókeypis á Gransking.fo
- https://gransking.cdn.fo/savn/kjlllj43/faeroeske-kvinders-mentale-sundhed-under-graviditet-og-efter-foedsel-sanne-storm-forskningsrapport-maj-23-5-2023.pdf?s=oDxpLfK8uQWwoG-bP-6EeR1YsnI

Vísindavøka